# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*21. januar fingu Jensa Sirdal og Kartin Sivertsen, Klaksvík, eina dóttir. Hon var 53 cm long og vigaði 4500 gr. Stóribeiggi eitur Tróndur.*

20. januar fingu Sólrun Jacobsen og Ditlev Winther, Nesi, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4260 gr.

20. januar fingu Regitsa og Hans Olaf Johannesen, Froðba, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3710 gr.

25. januar fingu Malan og Øssur Steinhólm, Leirvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4250 gr.

25. jan. fingu Kristina undir Leitinum og Hans Kári Vang, Keypmannahavn, eina dóttir. Hon var 50 cm long og vigaði 3100 gr.

27. januar fingu Hansina Ludvig og Thorbjørn Hermansen, Trongisvági, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3800 gr.

28. januar fingu Tove Kruse og Karl Eli Samuelsen, Eiði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3400 gr.

29. januar fingu Heidi N. og Jógvan Kristin Olsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3700 gr.

1. februar fingu Annika Andreasen og Kári Nielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4150 gr.

## Andlát

26. januar
Hjørleif Enni, keypmaður, Tvøroyri, 88 ár
Gunnleiv Hansen, Tórshavn, 72 ár

27. januar
Otto Eliasen, Fuglafjørður, 83 ár.
Albert Hentze í Vági, 50 ár
Kirstin Ramussen, Tórsshavn, fødd Olsen, ættað úr Leirvík, 85 ár.
Hannemia Høj, Tórshavn, 81 ár

28. januar
Kjartan Gregersen, Syrðugøta, 78 ár
Hans Andreas Hansen, vanliga nevndur Dia, á Kynn í Lamba, 85 ár

29. januar
Sigmund Petur Langgaard, 72 ár.

30. januar
Maud Sonja Justinussen, dóttir Stefaniu og Jógvan Justinussen, Streymnes, 32 ár.
Anna Petersen, í Havn, fødd Heinesen, ættað úr Sandavági, 74 ár.

1. februar
Viggo í Stórustovu, ættaður úr Havn, bús. í Silkeborg, 71 ár.

2.februar
Eliesar Magnussen, vanliga nevndur Eliesar á Oyri, í Vági, 91 ár.

# Antines Iversen seksti ár



Antines var føddur 4 februar 1945. Hann er sonur Jóannes og Ebbu Iversen. Jóannes var ættaður úr Kvívík og Ebba úr Skúvoy. Antines er næstelstur av fimm sysktjum. Elst er systurin Ívun og so eru tað beiggjarnir Johannes Eli, Helgi og Hanus. Antines sleit sínar barnaskógvar í Kvívík, har hann eisini gekk í skúla. Seinni gekk hann í skúla í Vestmanna. Tá ið hann hevði frí úr skúlanum hjálpti hann m.a. foreldrunum við kúnni og seyðunum og annars tí, ið var at takast við í einum húsi tá á døgum. Sum blaðungur fór hann at arbeiða við at gera Oyggjarvegin og arbeiddi har eitt skifti. Hugurin til at arbeiða úti og vera í náttúruni hevur altíð verið stórur, og tí hevur starvið sum landmálari á Matrikulstovuni hóvað honum sera væl. Hetta starv hevur hann røkt væl, ja í heili 41 ár. Antines hevur tvær døtrar Onnu Elisabeth og Eydnu, og abbabørnini eru fimm í tali. Antines var í nógv ár formaður í Róðrarsambandi Føroya, har ímillum annað hjartamálið hjá Antinesi var at fáa róðrafólkið at nýta vestar undir venjing, fyri at økja um trygdina hjá róðrarfólkinum. Antines er framvegis sera íðin tá kappróður er á skránni, serliga tá áttamannaf　ørini rógva. Helst man tað vera Kvívíkingur,ið spøkir aftur og fær adrenalinið upp á at dansa hjá Antinesi. Hann er tiltikin Kvívíks fjeppari har hann stendur á kajuni á og geylar so at tað hoyrast um alla vágna. Í frítíðini dáma honum og Mariu sera væl at ganga í fjøllunum. Tað munnu vera fáir fjallatindar tey í felag ikki hava staði á. Eisini fæst Antines nógv við seyð og annað ið hevur við seyðahald at gera. Hann hevur eisini fingið ein serligan áhuga í at laga grót tey seinastu árini og ikki kann sigast annað enn, at væl liggur fyri. Av sonnum kann sigast, at Antines er ein sannur arbeiðshestur og nærlagdur sum fáur og altíð klárur við eini hjálpandi hond.

Vit vilja ynskja tær hjartaliga tillukku á hesum runda degi og takka fyri alt tað tú ert og gert fyri okkum.

**Børn og abbabørn**

Fyri 25 árum síðan:

# Sjúkrasystrar fingu prógv í februar 1980



*Seinast í februar 1980 tóku 13 sjúkrasystrar prógv á Sjúkrasystraskúla Føroya.*
*Aftara rað f.v.: Naina Poulsen, Jonna Hansen, Torgerð Vilhelmsen, Hildur við Høgadalsá, lærari, Aurora Weihe, lærari, Poula Poulsen, fyristøðukvinna og lærari, Birgitte Rasmussen, Anne Lise Winther, lærari, Herdis Weihe, og Laila Dam.*
*Fremra rað f.v: Ása Isaksen, Johanna Johannesen, Elisabeth Poulsen, Æna Reinert, Ása Petersen, Mirjam Heinesen og Arnfrí Mikkelsen.*

*Kelda: Myndaárbókin- árið ið fór 1980*